Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Barnaverndartænastur og barnaverndarlógin

Spurningar:

1. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at barnaverndirnar kring landið halda Barnaverndarlógina og liva upp til ásetingarnar í lógini um eftirlitsvitjanir og barnasamrøður?
2. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at tænastustøðið hjá barnaverndartænastunum er á sama støði um alt landið?
3. Hvat hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið gjørt fyri at tryggja, at barnaverndarlógin verður fylgd, eftir at Løgtingsins Umboðsmaður hevur víst á, at ásetingar í lógini ikki verða hildnar?

Viðmerkingar:
Løgtingsins Umboðsmaður hevur í mars 2023 almannakunngjørt úrslitið av eini kanning av, um barnaverndartænasturnar gera tær eftirlitsvitjanir og hava tær barnasamrøður við børn, sum eru sett heiman, sum eru ásettar í § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini.

Umboðsmaðurin kom fram til, at barnaverndartænasturnar alt ov ofta ikki halda ásettu freistirnar fyri eftirlitsvitjanir og barnasamrøður, sum eru ásettar í lógini. Lógin ásetur, at barnaverndartænasturnar skulu gera minst tvær árligar eftirlitsvitjanir hjá børnum, sum eru sett heiman. Tá skal barnaverndartænastan tosa við barnið – helst í einrúmi.

Kanningin vísir eisini, at í summum førum vóru ár millum hesar eftirlitsvitjanir og/ella barnasamrøður. Í onkrum førum høvdu als ongar eftirlitsvitjanir verið.

Umboðsmaðurin vísir í kanningini á, at hetta als ikki er nøktandi. Endamálið við eftirlitsvitjanum og barnasamrøðum er at tryggja, at barnið hevur tað gott, trívist og mennist – og at fyriskipanin, sum er sett í verk, stuðlar hesum.

Harafturat vísir kanningin, at ongar skipaðar mannagongdir eru fyri hesum eftirlitsvitjanum og barnasamrøðum – og skjalfestingin og journaliseringin er tilvildarlig.

Fyri at fáa greiðu á, hvør støðan er í hesum týdningarmikla máli, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 22. januar 2024

Liljan Weihe